

## HR- og menningarfólk

Broytingar og menning eru lyklaorð í ein hvørjari nútímans fyritøku, og tí hevur Tórshavnar kommuna tikið stig til at seta eitt HR- og menningarfólk í starv.

Starvið er knýtt at starvsfólkadeildini og kemur á einum strategiskum støði at arbeiða við menning av einstaka starvsfólkinum, deildunum og kommununi sum heild. Hetta, bæði fyri at kommunan kann vera eitt mennandi og spennandi arbeiðspláss, og fyri at kommunan á dygdargóðan hátt kann røkja uppgávurnar, ið liggja fyri framman.

Uppgávurnar í nýggja starvinum eru sera fjølbroyttar, og tú kemur í stóran mun sjálv/ur at skapa innihaldið í starvinum. Tó liggja yvirordnað strategi og politikkur, starvsfólkapolitikkur, tørvskanningar, leiðslu- og starvsfólkamenning, eisini tvørtur um fyrisitingar, frammaliga í løtuni.

**Førleiki**
Ynskiligt er, at tú hevur viðkomandi hægri útbúgving ella samsvarandi royndir, arbeiðir sjálvstøðugt og dugir væl at samskifta, bæði í skrift og talu.

Ynskiligt er, uttan at tað er ein treyt, at tú hevur royndir innan HR, coaching, undirvísing og projektarbeiði.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett skjótast til ber og verður lønt sambært avvarðandi sáttmála.

**Meir fæst at vita**
um starvið á www.torshavn.fo ella við at venda sær til Janus Isfeldt, deildarleiðara ella Bjørgfríð Ludvig, miðfyrisitingarstjóra, tlf. 302010.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir, skal vera Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi 25. september 2006. Merk umsóknina „HR- og menningarfólk". Setanarsamrøðurnar verða ætlandi í viku 39.

Starvsfólkadeildin umsitur í løtuni starvsfólka- og lønarviðurskiftini og hjá teimum yvir 1.200 fólkunum, ið starvast hjá kommununi og ráðgevur í hesum sambandi miðfyrraðu deildir og stovnar kommununnar.

Framyvir er HR- og menningarøkið eisini ein partur av arbeiðsøkinum hjá deildini.

Á starvsfólkadeildini starvast í løtuni fimm fólk, umframt at tríggir næmingar eru knýttir at deildini.

**Lesið meira um onnur størv á www.torshavn.fo/leysstorv**

**Tórshavnar kommuna**

---

# Advokatskrivstovan

Fr. Petersensgøta 9 · Postbox 6 · FO-110 Tórshavn
Tel (298) 311145 · Fax (298) 311525



## Ognirnar Tinghúsvegur 44 og 46
### ávíkavist matr. nr 449 a og 450, Tórshavn

Vegna Føroya Skiftirætt verða ognirnar lýstar til sølu.

Talan er um tvey grundøki við ástandandi sethúsum, sum eru samanbygd tvørtur um mark.

Matr. nr. 449 a (nr. 44)

Stykkið er 520 m2, og umframt húsini er eisini hjallur og stór garaga á stykkinum. Húsini eru helst uml. 100 ára gomul, byggiárið er ikki upplýst. Húsini eru bygd sum sethús við kjallara, miðhædd og lofti, uml. 40-50 m2 hvør hædd. Kjallarin er óinnrættaður, miðhæddin hevur verið nýtt til vinnuligt endamál. Á loftinum er innrættað íbúð við gangi, køki, stovu og tveimum kømurum. Grundi er laðað, húsini eru úr timbri, klødd við tjørupappi og tekjan er av alumuminium.

Matr. nr. 450 (nr. 46)

Stykkið er 132 m2. Húsini eru uml. 90 ára gomul við kjallra, miðhædd og lofti, uml. 50 m2 hvør hædd. Harafturat er tilbygningur, sum stendur inni á matr. 449 a. Grundin er laðað, húsini eru annars gjørd úr timbri og klødd við tjørupappi. Tekjan er úr aluminium.

Kjallari: Tvey kjallararúm
Miðhædd: Gangur, køkur, stova, wc og trappa uppá loftið.
Loft: Gangur, 4 kømur og wc.

Bæði húsini krevja stórar ábøtur. Hinvegin er talan um tvey grundøki, tilsamans 652 m2 mitt í býnum við góðum møguleikum fyri um- og nýbygging til vinnuligt og bústaðarendamál.

Ognirnar verða seldar undir einum og um hóskandi boð fæst.

Skiftirætturin tilskilar sær rætt at velja millum innkomin tilboð og til ongum at taka av.

Nærri upplýsingar um ognirnar fáast frá

**Advokatskrivstovuni**
**Fr. Petersensgøtu 9**
**100 Tórshavn**
**Tel 311145**
**att: Fríða Patursson, adv. (frp@jurs.fo)**
**ella skrivaran**
**Maibritt Johannesen (maj@jurs.fo)**

Sosialurin 341800

---

ADVOKATVIRKIÐ

## Trøð á Sandi

Trøðin, matr.nr. 15a, Sandur verður við hesum lýst til sølu.

Trøðin liggur á Fjalsdalinum vestan fyri vegin, norður-vestan fyri Meginskúlan. Hon er 10.709 m² og er partvíst dyrkað. Hon er ikki vetrarfriðað.

Trøðin verður seld til hægstbjóðandi.

Sigmund Poulsen, advokatur

**ADVOKATVIRKIÐ**
**Páll Nielsen Eyðhild Skaalum**
**Sigmund Poulsen Hans Trygvi Teirin**
Skansavegur 1, Postsmoga 85, 110 Tórshavn
Telefon 312171 - Telefax 315874
E-mail: advokatvirkid@advokatvirkid.fo

---

# Til leigu í Vági

Handilshøli – umleið 7 x 14 m
– mitt í Vági til leigu

**Ring 37 33 46 eftir kl. 13**

Sjó-El

---

# KIOSK ACTIV

Søkt verður eftir starvsfólki til dagvakt frá 13-19 at byrja skjótast gjørligt

**Kiosk Activ · J. Bronckgøta 44**

---

Nýtt múraravirki

**Vit átaka okkum alt múraraarbeiði...**

sp/f MÚRARAVIRKIÐ RDC
tel 59 20 30